# Fundarfrásøgn

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Sendast til: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Jørgen Meitilberg (JM), Malan Marnersdóttir (MM) og Hans Pauli Joensen (HPJ) |
| Til staðar á fundinum vóru: | SíJ, HPJ og Randi Frederiksberg (RF) |
| Skrivað hevur: | RF |
| Fundartíð: | Týsdagur, 20. november 2012, kl. 10 til 11.30 |
| Fundarstað: | Setursskrivstovan (SSS) |

## Endamál við fundinum: Regluligur vikuligur leiðslufundur

## Umrødd evni:

1. Skipan av fundum og fundarfrásagnum framyvir
   Stutt samskifti um, hvussu framyvir er ætlanin at skipa fundarskráir, fundarfrásagnir og viðmerkingar, eins og almennu kunningina frá fundunum til restina av Setrinum. Verður stutt gjøgnumgingið við byrjan av næsta fundi.

2. Val av stýrislimum, kunning
   JM hevur ábyrgd av hesum. Væntandi verður valið 11. december – JM kunnar nærri á næsta fundi.

3. Ph.d.-kunngerðin
   Er liðugt avgreidd av Setrinum og send Mentamálaráðnum til víðari viðgerð.

4. Vantandi reglur um gjaldsskeið
   JM hevur gjørt vart við, at tað er ein trupulleiki, at ymiskar reglur eru galdandi á deildunum, hvørt skeiðsgjald verður tikið fyri stakgreinaskeið ella ikki. Verður tikið upp til næsta fund.

5. Hagtøl, status
   Setrið hevur fingið umbøn frá Mentamálaráðnum um hagtøl, sum ikki eru tøk við verandi skráseting. Viðgjørt var, hvussu hesin trupulleikin kann loysast.
   Farið verður nú undir at gera eina støðulýsing av Setrinum, sum skal brúkast til víðari strategiarbeiði. Eisini í hesum arbeiði eru neyðugt við góðum hagtølum.

6. Kunning um status í arbeiðinum at umleggja KT tænastuna
   Rektarin kunnaði um, hvussu langt arbeiðið er komið. Eftir ætlan verður fyrsti partur av veitingini latin tann 19. december í ár.

7. Fíggjarstýring – Fíggjarætlan 2013
   HPJ legði fram yvirlit yvir nýtsluna á konto 14 og 15 fyri sína megindeild. Yvirlitið byggir á søgulig tøl nøkur ár aftur í tíðina.

## Næsti fundur:

Týsdagin 27. november 2012, kl. 9 til 11